

# Sjáldsom skrúðgonga

Í mars mánaði í ár kallaði nevndin í NFÍ til fundar, har øll við áhuga fyri stevnuni kundu møta.

Síðani tá er eitt stórt arbeiði gjørt til tess at samskipa øll tiltøkini og gera skránna so áhugaverda og nýskapandi sum tilber.

Ein av teimum serstøku upplivingunum á ársins stevnu, er ein skrúðgonga, sum verður leygardagin eftir ársins fyrsta kapproður. Byrjað verður úr Klaksvíksgarðinum og heim í Vágstún.

Henda skrúðgongan verður borin uppi av sangi, tónleiki, dansi og dramatisering, og endar hon við nøkrum so sjáldsomum sum eini kappkoyring við kassabilum úr Kirkjubrekkuni og oman í Vágstúni.

Ætlanin er, at henda skrúðgongan skal steðga á niðanfyri sjúkrahúsið og heilsa teimum sum orsakað av sjúku ella elli ikki kunnu verða við á stevnuni. Longur heimi verður steðgað á við Víkabrekkuna, har tónleikur og onkur framførsla verður á skránni.

Til tess at standa fyri hesum serstaka tiltakinum er sjálvandi neyðugt at hava løgregluna at ganga á odda. Tað verða tó ikki tveir vanligir løgreglumenn sum ganga á odda, men teir báðir kendu og barnavinarligu løgreglumenninir Jógvan og Erling sum skipa skrúðgonguna.

# Fyri børn og barnsligar sálir

Undir hesi yvirskriftini verður ein roynd gjørd at vekja størri ans fyri teimum eginleikum, sum menniskju hvør á sín hátt bera, og sum frítíðarfeløgini á ein virðiligan hátt virka fyri at menna, sigur Norðoyar Frítíðar- og Ítróttarráð í eini innbjóðing til ársins fyrstu summarstevnu.

– Tað er tí okkara vón, at vit sum búgva her og eru vertir, vísa tað besta í okkum - barnið - og geva tí gætur, sum børn og ung í dag brúka stóran part av sínari frítíð til.

– Tí børn eru børn, og tað verða vit við, tá vit líð um líð vísa hvørjum øðrum at vit gleðast um tað frítíðarfeløgini gera fyri okkara samfelag, verður sagt.

Við tiltøkum í ár, har børn og ung og barnsligar sálir eru í miðdeplinum og har børn og ung og barnsligar sálir eru høvuðsmálbólkurin, er norðoyastevnan 2010 ein liður í at koma úr rundkoyringini og út á høvuðsvegin!

Tiltøkini fevna bæði um ítróttarkappingar, mentanartiltøk, kristilig tiltøk, tónleik, dans og mangt annað, fyri ikki at gloyma kabarettina hjá sjónleikarfelagnum.

– Um vit í felag gera møguligar dreymar og ímyndir, sum fólk og frítíðarfeløg bera til veruleika, tá gerst eisini norðoyastevnan eitt gott amboð, til at kjølfesta góð minni í børnum og ungum, sum hava vekjandi og lekjandi árin á lívsleið teirra, sigur Norðoya Frítíðar- og Ítróttarráð.

Við hesum í huga ynskja tey øllum norðoyingum og norðoyastevnugestum eina góða stevnu.

snorri@sosialurin.fo

